

# Fartelefonir loyvdar á Landssjúkrahúsinum

**Fullkomna bannið av fartelefonum á Landsjúkrahúsinum, verður í næstum avtikið. Loyvt verður at tosa nærum um alt sjúkrahúsið**

Síðani fartelefonin fór at vera hvønnmansogn, hevur tað verið ein stórur bági hjá sjúklingunum, at tað ikki hevur verið loyvt at nýta hana á sjúkrahúsinum.

Hetta hevur eisini økt um arbeiðsbyrðina hjá telefondamuni í vekslaranum, eins og hjá sjúkrasystrunum, sum máttu taka sær av at heinta rullandi mynttelefonirnar og seta tær upp á pláss aftur, eftir at sjúklingarnir høvdu lænt tær.

Men nú er vent í holuni og politikkurin viðvíkjandi tartelefonum er nú broyttur.

Hetta fer at vera ein stórur lætti hjá teimum mongu sjúklingum, sum hava egna fartelefon við, og sum nú kunnu ringja, uttan nakran trupulleika. Eisini verður tað ein stórur bati hjá avvarðandi, sum nú fáa beinleiðis samband við sjúklingin, uttan nakað stríð – og uttan at verða til stríð hjá øðrum.

### Undantøk

Nøkur undantøk vera tó, har ikki verður loyvt at tosa í fartelefon. Tey mest viðkvomu kanningartólini tola nevniliga ikki geislingarnar frá fartelefonunum, og tey kunnu tí verða ávirkað.

Væl og virðiliga verður tó skeltað, um hvar verður loyvt at tosa og ikki.

Av Landssjúkrahúsinum frættist, at eisini grannalond okkara eru farin frá at hava fullkomið fartelefonbann.

Seinnu árini eru nevniliga gjørdar langar og neyvar kanningar, um geislingina frá fartelefonum. Hesar kanningar hava víst, at vandin fyri, at tólini verða ávirkað, er ógvuliga lítil.

Tey tól, ið verða framleidd í dag, eru somuleiðis øll sera væl vard ímóti fartelefongeisling.

So um tú skalt innleggjast í Havn, so kanst tú trygt leggja tær fartelefonina í taskuna.

Skeltini, ið siga »fartelefonin bannað», verða framyvir nevniliga ikki at síggja allastaðni á Landsjúkrahúsinum.

**–eys–**

# Kvinnufelagið stuðlar valevnunum

**Kvinnufelagið, sum í mong ár hevur stuðlað kvinnuligu valevnunum við ymiskum tiltøkum, hevur aftur í ár rætt teimum eina hjálpandi hond. Í ár verður Mettustova latin ókeypis til kvinnuligu valevnini at nýta sum teimum lystir**

KOMMUNUVALIÐ
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Kvinnufelagið í Havn hevur í fleiri ár verið ein dyggur stuðul hjá øllum teimum kvinnuligu valevnunum í Tórshavnar kommunu. Undan hesum ymisku valunum, hevur felagið millum annað skipað fyri tiltøkum í Norðurlandahúsinum, Meiarínum, Kommunuskúlanum og í Mettustovu. Í ár er tó ætlanin at veita stuðulin á ein nakað øðrvísi hátt.

### Lata Mettustovu

Kvinnufelagið í Havn húsast í Mettustovu úti á Reyni. Og tað verður eisini Mettustova, sum verður karmur um stuðulin til kvinnuligu valevnini til býráðsvalið í ár.

– Vit hava tikið avgerð um, at lata øllum teimum kvinnuligu valevnunum Mettustovu til láns. So kunnu tær nýta húsið á bestan hátt, antin til politiska café, fundir ella annað, sum tørvur nú er á. Tær kunnu sjálvar ráða, greiðir Inga Ellingsgaard, limur í kvinnufelagnum frá.

Fyrr hevur felagið annars havt stórar kampagnur koyrandi fyri kvinnuligu valevnini, men tað gerst dekan ov dýrt í longdini. Lýsingarnar kosta ikki einki, og at leiga onnur høli til kvinnupolitiskar fundir, er eisini dýrt, greiðir Inga frá.

– Vit vilja allíkavæl so fegnar stuðla tær á onkran hátt og tí hava vit bjóðað teimum hølini hjá okkum at ráða yvir. Mær vitandi er tað enn bert Javnaðarflokkurin, ið hevur sagt ja takk, men vit skulu hava fund við allar flokkarnar mánadagin, so tá fáa vit at síggja hvussu verður, sigur Inga.

Hon leggur dent á, at Mettustova er eitt tilboð til allar flokkar.

– Sjálvandi er tilboðið galdandi fyri allar flokkar. Vit eru ikki eitt partapolitiskt felag, men vit vilja stuðla teimum kvinnum, sum velja at fara upp í politik, sigur hon.

Inga heldur, at tað er týdningarmikið fyri kvinnurnar at vita, at onkur er, sum bakkar tær upp og sum stuðlar tær, óansæð hvønn flokk tær stilla upp fyri.



*Inga Ellingsgaard í Kvinnufelagnum sigur, at Mettustova verður til taks hjá øllum kvinnuligum valevnum í Tórshavnar kommunu hetta til valið*

*Savnsmynd*



### Politiska skipan

Inga sigur seg halda, at kvinnur hava eina heilt øðrvísi hugsan um politikk enn mannfólkini hava.

– Tú sært menninar stilla upp val eftir val, meðan kvinnurnar ógvuliga ofta taka seg aftur, tá tær hava sitið í eini tvey skeið. Kvinnurnar blíva ikki við at vera í politikkinum alt lívið, vísir tað seg. Eg haldi, at vit prioritera lívið øðrvísi, tí tað vísir seg at konufólkini fara nógv skjótari úr politikkinum aftur í mun til menninar, heldur Inga.

Av tí, at menninir hava stýrt politiska pallinum so leingi, og tí teir sum oftast eru í meiriluta, kann tað hugsast, at politiska skipanin og arbeiðshættirnir eru lagdir til rættis av monnum til menn. Tað er millum annað tí, at Mettustova bert verður latin kvinnunum.

– Tað kann so væl vera, at kvinnurnar av og á hava tørv á at tosa saman einsamallar, uttan at verða órógvaðar av nøkrum. Hetta verður ein fínur møguleiki til tað. Eisini verður møguleiki at skipa fyri onkrum tvørpolitiskum. Og vónandi verður eisini skipað fyri onkrum, sum vit onnur eisini kunnu koma við til og fáa gleði av, sigur Inga.

Inga sigur, at tær í Kvinnufelagnum so inniliga vóna, at flokkarnir fara at taka av hesum tilboðnum, sum ikki kemur at kosta teimum eina krónu.

– Hetta skal vera okkara ískoyti til at hjálpa kvinnuligu valevnunum í ár, sigur Inga Ellingsgaard at enda.



Konjekturfrágreiðing hjá Búskaparráðnum:

# Reiðarafeløg og fiskimannafeløg stýra fiskivinnupolitikkinum

**Sambært feskastu frágreiðingini hjá Búskaparráðnum eru tað fyrst og fremst fakfelagsleiðararnir Jákup Sólstein og Óli Jacobsen og teirra limir, sum stýra føroyska fiskivinnupolitikkunum og ikki landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø, og samgongan**

KONJEKTURFRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

..."Myndugleikarnir hava latið reiðarafeløg og fiskimannafeløg havt ræðið á fiskivinnupolitikkinum, heldur enn at reka egnan politikk í landinum sum heild at gagni"

Hósmorgunin kom konjekturfrágreiðingin fyri 2004 frá Búskaparráðnum, og ráðið leggur ikki fingrarnar ímillum, tá spurningur um, hvør stýrir føroyska vinnulívinum verður umrøddur.

Búskaparráðið fýlist harðliga á, at politiski myndugleikin ferð eftir ferð gongur beinleiðis ímóti tilmælum frá bæði fiskifrøðingum og búskaparfrøðingum. Í frágreiðingini verður víst á, at Búskaparráðið hevur fleiri ferðir heitt á landsins myndugleikar um liberalisera fiskiskapin, men uttan úrslit.

– Búskaparráðið hevur síðan tað varð sett á stovn víst á, at galdandi regluverk um fiskiskapin førir til spill av vinnuligum tilfeingi og mótvirkar, at vit kunnu fáa sum mest av búskaparligum gagni úr fiskiskapinum, stendur millum annað skrivað í frágreiðingini.

Í frágreiðingini verður eisini sagt, at politisku myndugleikarar hava størri áhuga í at verja áhugamálini hjá verandi loyvishavarum í fiskivinnuni, heldur enn at skipa fiskiskapin við heildarbúskaparligum atlitum.



*–Hetta er ein heilt onnur støða, enn undir stóru kreppuni í nítiárunum, tá tað almenna ikki hevði ráð til at halda egna virksemið gangandi. Tað almenna hevur í hesum tíðum ráð til at virka stabiliserandi, við at halda fast um virksemi og møguleika styrkja búskapin við arbeiðsskapandi og neyðugum íløgum, sigur Búskaparráðið í feskastu konjekturfrágreiðingini.*

*Mynd: Savnsmynd*

### Politisk misrøkt

Búskaparráðið heldur, at búskaparpolitikkurin hjá landsins myndugleikum í dag er við at gera búskaparliga afturstigið størri enn neyðugt er. Í konjekturfrágreiðingini verður mint á, at upprunin til politisku kreppuna í nítiárunum var búskaparpolitikkurin í áttatiárunum.

– Í teimum trimum týdningarmestu útflutningsvinnunum eru í dag trupulleikar, sum millum annað stava frá politiskari misrøkt, stendur skrivað í frágreiðingini.

Búskaparráðið sipar her til, at politiski myndugleikin ikki hevur verið nóg dugnaligur til at tillaga fiskaframleiðsluna í Føroyum, eftir at kappingin úr Asia og Eysurevropa er harðnað nógv.

– Tað almenna hevur ikki skilt týdningin av, at júst fiskavirkini komu á privatar hendur so skjótt sum til bar, og av hesum kann standast størri skaðið enn neyðugt var, verður skrivað í konjekturfrágreiðingini.

Búskaparráðið fýlist eisini á, at flestu vinnupolitisku tiltøkini í fiskivinnuni hava til endamáls at verja verandi arbeiðspláss og verandi fyritøkur, heldur enn at lata fría kapping valda.

– Forðingar fyri eitt nú virking umborð á fiskiførum í føroyskum sjógvi, avmarkingar fyri avreiðing uttanlands, stuðul av ymsum slag fyri at fáa fisk virkaðan í Føroyum- slík tiltøk verja væl um arbeiðspláss og fyritøkur í hesum vinnum, men forða samstundis fyri einari neyðugari javnari tillaging til broytt marknaðarkor.

### Ikki samanbera nítiárini

Í frágreiðingini verður staðiliga víst aftur, at djúpa kreppan í nítiárinum vitjar aftur í Føroyum nú. Búskaparráðið vísir á, at talan er um eitt afturstig og ikki eina kreppu.

– Hetta er ein heilt onnur støða, enn undir stóru kreppuni í nítiárunum, tá tað almenna ikki hevði ráð til at halda egna virksemið gangandi. Tað almenna hevur í hesum tíðum ráð til at virka stabiliserandi, við at halda fast um virksemi og møguleika styrkja búskapin við arbeiðsskapandi og neyðugum íløgum, verður sagt í frágreiðingini.

Víst verður á, at búskaparliga støðan í løtuni er heldur ein konjekturafturgongd, sum vit vanliga uppliva.

– Afturgongdin stendst partvís av náttúrugivnum ávum, av broytingum í eftirspurninginum uttanlands, og av tí vit ikki fara við tilfeingisvinnunum á forsvarligan hátt og tí vit oftast reka ein viðrekandi fíggjarpolitikk, verður sagt í frágreiðingini.

Í frágreiðingin verður lagt afturat, at búskaparligu trupulleikarnir í løtuni kunnu metast sum ein bráðfeingis trupulleiki, sum ikki verður varðandi.

– Fiskiskapurin batnar einaferð aftur, tá gróðurin í sjónum er til vildar, alingin tekur seg upp aftur, tá íleggjarar síggja møguleikar í vinnuni aftur, og almennu kassarnir fáa alop so hvørt sum vinnuligu parturin kemur fyri seg aftur.

Búskaparráðið sigur bart út, at tað ræður um politiskan dugnaskap, skal búskaparliga støðan í løtuni ikki gerast verri enn neyðugt er.

– Tað almenna hevur skyldu til at virka stabiliserandi, tá afturstig eru í vinnuligu konjekturunum. Hetta merkir í flestu førum, at tað almenna skal vera til reiðar at taka skuld á sínar herðar og tessvegna veita ta trygd, sum er neyðug í vánaligum tíðum. At tað almenna -tað er skattaborgarin-tekur skuld á seg í vánaligum tíðum merkir, at sami skattaborgari velir at gjalda eina rentubyrðu seinni, heldur enn at missa nýtslumøguleikan í dag.

# Makrel kappast í Danmark

**27. oktober skal føroyski tónleikabólkurin, Makrel, kappast í tónleikakappingini, Global Battle of the Bands, á lítla Vega í Danmark**

DANMARKARFERÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Føroyski tónleikabólkur Makrel skal seinni í mánaðinum luttaka í tónleikakapping í Danmark. 27. oktober skipa danir fyri kappingini, Global Battle of the Bands, á lítla Vega, og Makrel verður millum bólkarnar.

Talan er um eina altjóða kapping, sum fyrst er skipað sum ein undankapping, og síðan við einum finaluumfari. Undankappingin verður í 16 ymiskum londum, har í millum Danmark. Finalan í Global Battle of the Bands verður hildin í London 30. november í ár, og vinningurin er einki minni enn 100.000 amerikanski rdollarar.

Í undankappingini í Danmark verða bólkarnir Mia Mirror, grasp, Bearfoot, ca8, 3 og føroysku Makrel. Bólkarnir framføra 2-3 løg hvør, og besti bólkurin fer víðari í finaluumfarið

### Nýggj manning

Sammett við manningina hjá Makrel í summar, eru tveir nýggir limir komnir í bólkin. Talan er um bassspælaran hjá Prix Føroyar-vinnarunum, Gestum, Niels Jákup í Jógvanstovu, og kvinnuliga keyboardspælaran, Halltóru Henriksen. Bæði Niels Jákup og Halltóra verða millum tónleikararnar hjá Makrel, tá bólkurin skal royna seg á lítla Vega seinni í mánaðinum.

Vanligi bassspælarin hjá Makrel, Hergeir Staksberg, er farin uttanlands í lestrarørindum, og tí loysir Niels Jákup í Jógvanstovu hann av í løtuni.